## Ikki met hjá AaB

Talan var ikki um Champions League-met, tá AaB í gjárkvøldið tapti 6-3 á útivølli móti spanska Villarreal. Málmetið fyri ein dyst í søguni hjá Champions League er fimm ára gamalt, og setti franska Monaco hetta, tá teir vunnu ikki minni enn 8-3 móti Deportivo tann 5. november í 2003. Hinvegin var dagurin í gjár tann málríkasti í søguni hjá Champions League við ikki færri enn 36 málum í átta dystum.



## Átta dystir í kvøld

Aftur í kvøld eru átta dystir á skránni í Champions Legue. Talan er um seinnu helvt av triðja umfarið í bólkaspælinum, og eru dystirnir hesir: Bordeaux-Cluj-Napoca, Chelsea-Roma, Inter-Anorthosis Famagusta, Panathinaikos-Werder Bremen, Shakhtar-Sporting, Basel-Barcelona, Atletico Madrid-Liverpool og PSV-Marseille.

## John var nøgdur við innsatsin

John Petersen var fyrsti maður at ynskja EB/Streymi til lukku við føroyameistaraskapinum, men eftir dystin hevði hann ikki so nógv at siga.

- Vit vóru longu fluttir niður, so uppleggið í dag var at fara inn á vøllin at hava tað stuttligt, spæla frítt og hugna okkum. Hetta megnaðu vit, men tíverri taptu vit dystin, segði venjarin hjá liðnum, ið var tað fyrsta at flyta niður í 1. deild komandi ár. John Petersen var sum heild fámæltur, men eitt lítið smíl sá út til at vera har. Hóast Skála skal spæla ein dyst afturat, áðrenn teir sleppa í gongd við arbeiðið at flyta uppaftur í bestu deildina

-EIJ

## Gullradio fríggjadagin

Fótbóltsgullið hjá EB/Streymi ávirkar sjálvandi eisini skránna hjá Rás2.

Fríggjadagurin verður nú allur sum hann er settur av til føroyameistarnar, sum spæla sín seinasta dyst leygardagin.

- Vit vóru júst byrjaði við rásini, tá NSÍ vann gullið í fjør, og ta ferðina gjørdist talan um eina rúkandi succés við gull-radio, har alt økið bakkaði upp kring sendingina. Og á sama hátt vilja vit heiðra EB/Streymi, nú teir hava vunnið gull, og vónandi fær sendingin eins góða móttøku hesaferð, sigur Birgir Waag Høgnesen, marknaðarleiðari á Rás2.

-mørk

B68-ÍF 0-1 (0-0):

# ÍF kom upp á turt

*B68*

*ÍF*

**ÍF nýttist onga hjálpandi hond frá Víkingi, tá teir sjálvir syrgdu fyri at steðga góðu gongdini hjá B68**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Talan var um hálvgum linliga uppgerð á Svangaskarði, men fuglfirðingarnir gjørdu tó sína skyldu, soleiðis at teir eisini spæla í Formula-deildini næsta kappingarár*
*savnsmynd*

Eitt einsamalt mál frá Andy Olsen var nóg mikið hjá ÍF ,sum í gjár vann eina heldur linliga uppgerð á Svangaskarði.

Fuglfirðingar vóru undan dystinum fimm stig framman fyri B71 á níggjunda plássinum, og við dysti móti júst sandoyingunum í seinasta umfarinum ráddi tí um hjá ÍF at bjarga sær upp á turt, áðrenn tað gjørdist alt ov spennandi.

Og tí setninginum rukku teir. Talan var um ein heldur linligan dyst, har tað ikki hendi tað heilt stóra framman fyri báðum málunum. Ein støða, sum ÍF tó eisini væl kundi liva við, tí ein javnleikur vildi í roynd og veru beint allan iva burtur.

Men seinasta restin av hesum hvarv tó heilt í seinastu løtuni av dystinum. Andy Olsen, sum kom til ÍF í summar, slapp leysur í høgra borði, og eftir at hava sneitt verjuspælara av, sendi hann bóltin fram við Vlada Filipovic í B68-málinum.

At Víkingur um sama mundi skoraði sigursmálið á Sandi, hevði sum so onga ávirkan á fuglfirðingar. Teir syrgdu sjálvir fyri sunnudagsfótbólti komandi kappingarár, og tí kunnu teir róliga bjóða sandoyingum á vitjan, tá kappingin endar leygardagin.

# Eg gav teimum eitt mál

Eftir dystin hittu vit René Tórgarð í skiftirúminum hjá EB/Streymi.
Tilukku við gullinum!
-Takk fyri tað.
*Hvussu kennist hetta?*
- Hetta er fantastiskt og ótrúliga lekkurt uppá allar mátar
*Hvat hendi har við málinum, sum Skála fekk?*
- Ja, eg gevi teimum eitt mál har, tað er so simpult sum tað, og tað er einki meira at siga um tað.
*Tað var kanska bara gávuhýri?*
- Ja tað var tað kanska, faktisk ja. Royndi at fáa eitt sindur av spenningi í aftur.
*Nú er hetta ikki fyrstu ferð, tú ert føroyameistari, tú hevur vunnið tað einaferð fyrr við B36, men spældi ikki so nógv tá, hvussu er hetta øðrvísi?*
- Hetta er eitt heilt annað følilsi uppá allar mátar. Tá tú situr á beinkinum alla tíðina, er tað slett ikki tað sama. Hetta er ótrúliga lekkurt uppá allar mátar, eitt fantastiskt følilsi.

**RN**




*René Tórgarð*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*